# Sosialurin 75

Í sambandi við at Sosialurin fyllir 75 ár bjóða vit tær at tekna teg sum haldara fyri 75 krónur fyri restina av ársfjórðinginum og samstundis at vera við í kappingini um hesar báðar vinningarnar:



## 1. Tøm Miklagarð

Í 10 minuttir kanst tú fylla so nógvar vørur í innkeypsvognin í Miklagarði í SMS, sum tú ført stundir til ... men bara eitt av hvørjum.

## 2. Dreymaferð við nýggju Norrönu

Vinn eina familjuferð við nýggju Norrönu hjá Smyril Line fyri 2 vaksin og 2 børn við bili




**Ja** eg tekni meg sum haldara av Sosialinum fyri 75 krónur fyri restina av ársfjórðinginum

Navn

Bústaður

Býur/bygd

Tel

e-mail

Send seðilin skjótast gjørligt til:
Sosialurin, Argjavegur 26, 160 Argir
ella faksa hann til fax nr. 314720



UTTAN ÚR HEIMI

# Misnøgdir ísraelsmenn krevja svar frá Sharon

**Ísraelski herurin hevur avbyrgt alt tað norðara økið á Vestara Áarbakka, men ísraelsmenn sjálvir leggja ikki í tiltøk, sum ikki tryggja frið kortini**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*

Í einari roynd at forða palestinskum yvirgangsmonnum at søkja at málum í Ísrael hevur stjórnin givið herinum boð um at byrgja allan tann norðara partin av Vestara Áarbakka av.

Men minni enn so allir ísraelsmenn taka undir við hesum politikkinum og vísa á, at Ariel Sharon, forsætisráðharri hevur framvegis ikki megnað at halda tað vallyftið um, at tað skal vera trygt at búgva í Ísrael. Tað var hetta lyftið, sum á sinni tryggjaði honum forsætisráðharrasessin.

Sunnudagurin var enn eitt prógv um, at politikkurin er miseydnaður. Tann dagin doyðu tólv fólk í atsóknum, og nú krevur størsta ísraelska blaðið eina frágreiðing frá Sharon. Blaðið nevnir, at tá Ísrael misti tólv hermenn í bardaga í Libanon, læsti táverandi forsætisráðharrin, Menachem Begin, seg inni í húsum sínum.

– Ariel Sharon, maðurin, sum gav okkum tey tómu lyftini um at tryggja frið í okkara heimum, gøtum, skúlum og bussum, læsir seg ikki inni, tí hann skammast ikki. Hann greiðir heldur ikki fólkinum frá sínum gerðum og mistøkum. Hann heldur fram, sum hann er vanur at gera, skrivar Amnon Dankner, blaðstjóri í blaðnum Maariv.

Sum eitt dømi um politikkin hjá stjórnini nevnir blaðið avgerðina at byggja ein trygdarmúr millum Ísrael og Vestara Áarbakka. Blaðið vísir á, at soleiðis sum arbeiðið nú gongur, fer tað at taka 40 ár at byggja múrin.



Nógvir ísraelsmenn halda politikkin hjá stjórnini vera skeivan og vilja hava eina frágreiðing frá Ariel Sharon, forsætisráðharra, sum her er avmyndaður saman við Shimon Peres, uttanríkisráðharra.

### Tikið bumbumenn

– Vit hava avbyrgt alt Samaria. Eingin sleppur inn hagar, og eingin sleppur út haðani, segði Benyamin Ben-Eliezer, verjumálaráðharri mánadagin. Hetta merkir, at palestinararnir sleppa ikki at ferðast millum býir so sum Nablus, Jenin, Qalqilya, Tulkarem og Ramallah. Samstundis er syðri partur av Gazageiranum avbyrgdur.

Benyamin Ben-Eliezer upplýsti samstundis, at ísraelski herurin hevur tikið 140 palestinar, sum høvdu sagt seg vera sinnaðar at fara til Ísraels sum sjálvmorðsbumbumenn.

Verjumálaráðharrin fanst at teimum, sum siga, at trygdarpolitikkurin hjá stjórnini er miseydnaður. Hann segði, at trygdardeildirnar hava forðað fyri 90 prosentum av teimum yvirgangsatsóknunum, sum palestinar høvdu ætlað at fremja.

### Krevur afturtøku

Samstundis krevur ST-aðalfundurin, sum Ísrael skal taka seg aftur av teimum hersettu palestinsku økjunum beinanvegin, soleiðis at markið verður tað, sum tað var, áðrenn ófriðurin brast á í september í 2000.

114 limalond atkvøddu fyri kravinum, fýra lond at kvøddu ímóti, og ellivu atkvøddu ikki.

Tað vóru ES og palestinska umboðið, sum orðaðu uppskotið. Orðaljóðið var ikki so hvast, sum tað mangan hevur verið, tá tað snýr seg um Ísrael, men úr New Yortk verður sagt, at palestinar mæltu til eitt veikari orðalag fyri at fáa sum flerst lond at atkvøða fyri kravinum.

# Nú er nóg mikið!

**Túsundtals spaniumenn fylgdu seks ára gomlu Silviu og 57 ára gamloa Cacilio Gallego til gravar. Tey bæði doyðu, tá ein bumba hjá baskiska felagsskapinum ETA brast í býnum Santa Pola.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Tey bæði fóru til gravar úr einari kirkju stutt frá bumbustaðnum. Millum teirra, sum vóru komin at fylgja, var spanski forsætisráðharrin, Jose Maria Aznar, og tað var týðiligt, at hann var ávirkaður av tilburðinum.

Uttan fyri kirkjuna mótmæltu fólk tí áhaldandi harðskapinum hjá ETA, og fleiri teirra róptu rakstrarróp eftir felagsskapinum og leiðarum teirra.

Tilburðurin í Santa Pola hevur vakt stóran ans um alt Spania, og almenn umboð úr øllum landinum vóru komin at fylgja. Tað bar eisini í sær, at trygdartiltøkini vóru sera umfatandi.

Enn hava myndugleikarnir ikki upplýst, hvør tann seks ára gamla gentan var. Hon verður bert umrødd sum Silvia, og eygleiðarar í Madrid ivast ikki í, at hon verður ein ímynd av harðskapinum hjá baskisku loysingarmonnunum. Sum er hevur ETA lítlan stuðul í spanska fólkinum, og tilburðurin í Santa Pola fer at hava við sær, at viðhaldsfólkini hjá ETA fara at fækka uppaftur meiri í komandi tíð.

# Blóðhundar leita eftir brævsendara

**FBI nýtir nú blóðhundar í arbeiðinum at finna mannin, sum í fjør sendi fleiri brøv við miltbrandsporum. Tað hevur givið úrslit.**

USA
*Árni Joensen:*

Til tess at venja hundarnar hevur løgreglan nýtt miltbrandbrøv, sum senatorarnir Tom Daschle og Patrick Leahy fingi seinasta heyst.

Eftir at hundarnir høvdu vant seg við, hvat tað var, sum teir skuldu leita eftir, hevur løgreglan latið teir kannað bústaðin hjá fólki, sum hava verið undir illgruna fyri at hava sent brøvini. M. a. vísti tað seg, at hundarnir gjørdust frá sær sjálvum, tá teir kannaðu íbúðina hjá einum manni, sum hevur arbeitt á einari granskingarstøð hjá amerikanska herinum.

FBI hevur hildið eygað við manninum seinastu mánaðarnar, men ein talsmaður hjá løgregluni sigur, at teir kunnu ikki skuldseta mannin, tí teir hava ikki tey neyðugu prógvini ímóti honum.

Sum skilst hevur FBI illgruna til tólv persónar í sambandi við miltbrandbrøvini.